HEILSANIR

Hey tit báðir
Hjartaliga tillukku við teimum hundrað árunum. Alt tað besta ynskja vit tykkum.
Petur, Súni, Jørgin og Anna

Góða Poulina og Knút
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum. Vit gleða okkum at síggja tykkum.
Heilsan omman og abbin í Toftalíð

Foreldur míni og eg takka øllum hjartaliga fyri, at tit gjørdu fermingardag mín tann 13. april so hugnaligan. Takk fyrivitjan, heilsanir, gávur og ikki minst fyri hjálpina.
Blíðar heilsur Barbara á Dunga

Hjartaliga tillukku við 100 ára føðingardegnum.
Heilsan ein vinur

Mínir kæru synir
Hjartaliga tillukku við tí runda talinum.
Kærar heilsanir mamma

Góði babba og gubbi
Hjartaliga tillukku við teimum 100 árunum. Tey allarbestu ynskir frá
Paulu, Súnfríð og Elisabeth

Góða fitta Paula
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan mamma og babba

Góða elskaða omma
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum í dag. Muss og klemm frá
Tóka



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum mongu, sum gleddu okkum á fermingardegnum 13. apríl.
Bestu heilsur Torvald

Góða Lovisa
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 21. juli.
Heilsan Aron

Góða Lovisa
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum mánadagin.
Heilsan omma

Góði Símun
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum. Ja, nú verður spennandi at byrja í skúlanum. Øll tey bestu ynskir frá
Sørin, lítla beiggja, mammu og babba

Góða Hansy
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Hetta vóru dagar. Her var tú ung. Alt gott í framtíðini ynskist frá okkum.
Vinkonan í Havn

Elskaða dukkan á Oyri
Tillukku við 5 ára føðingardegnum. Vit gleða ogun at koma norður.
Heilsan ommudidd og John

Góða Gunnvá
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Eg vóni at fært ein góðan føðingardag.
Bestu heilsanir frá babba

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 6. apríl. Túsund takk til tykkum øll, sum hjálptu so væl til bæði áðrenn og á sjálvum degnum.
Kærar heilsanir Kristina Arge

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

HEILSANIR

Góði Frank
Tær verður ynskt hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 18. juli. Bestu ynskir frá okkum
Anja og Jan

Góða fitta Ester
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum ímorgin.
Heilsan Óli, Jákup, Tóri, mamma og babba

Góði abbi
Hjartaliga tillukku við tí runda talinum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Abbabeiggi fær eisini eina heilsan.
Heilsan Sølvi, Karina og Jógvan

Góða Elinborg
Hjartaliga tillukku við teimum 19. Hetta var ein finur túrur. Góð vestanstevna.
Heilsan vit 5

Góði Gunnar
Hjartaliga tillukku við teimum 17. Tú kláraði akkurát ikki at krógva teg.
Heilsan vit 5

Góða fitta Sharada
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 16. juli. Kærar heilsanir tínir bestu vinir
Halla, Rógvi og Rúnar

Góða Rebekka
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum. Alt tað besta verður ynskt tær í framtíðini. Vónandi fær tú ein góðan dag.
Ynskja vit øll Sirið og Teresa

Góði abbi
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Vónandi fær tú nógv sjokulátu í føðingardagsgávu.
Ynskir Sólveig

Góði babba
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta ynskist tær.
Talita

Eg og foreldur míni takka øllum tykkum, ið gleddu meg á fermingardegi mínum 4. mai 2003. Takk fyri alla hjálp, gávur og fjarrit. Guds ríku singing ynski teg tykkum øllum.
Bestu heilsur Poula Lassen

Sethúsini Suðurrás 10, Tórshavn, til sølu

Húsini eru í 3 hæddum. Kjallari og miðhædd á 84 kvm og loft á 75 kvm. Grundøkið er 400 kvm. Byggiár 1974.

Í kjallararnum er íbúð við køki, stovu, kamari og wc. Eisini er vaskirúm, hjallur, fýrrúm og kjallararúm við trappuuppgongd.

Í miðhæddini er køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og durur.

Á loftinum er stova, 2 kømur, wc og lítil gongd.

Húsini og havin eru vælhildin. Húsini standa í friðarligum barnavinarligum umhvørvi og stutt er oman í býin.

Áhugað ringið **223369**

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

Økonomaassistentur/ køksassistentur

Í Sambandi við at ein økonomassistentur fer í farloyvi, verður eitt avloysarastarv sum økonomaassistentur lýst leyst til setan frá 1. oktober 2003 til 30. september 2004, ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 1,0.

Eitt starv sum køksassistentur verður hervið lýst leyst til setan frá 01. oktober 2003, ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðin er 0,7. Umsøkjarin skal vera útbúgvin køksassistentur, ella hava aðra líknandi kostútbúgving.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við økonomuna á tlf. 455463, lokal 202.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til Umsjónarmannin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 18.08.2003.